UTTAN ÚR HEIMI

## Krevur ráðharran frá

Einkjan eftir bretska hermannin Steve Roberts, sum doyði í Irak, krevur nú, at Geoff Hoon, verjumálaráðharri skal fara frá.

Samantha Roberts vil vera við, at maður hennara doyði, tí teir bretsku hermenninir í Irak høvdu ikki skottryggar búnar. Hon vísir á dagbókina hjá manninum. Har skrivar hann, at bretsku hermenninir í Irak eru illa útgjørdir, og at teir hava als ikki ta neyðugu útgerðina til eitt kríggj við irakar. Eisini er komið fram, at bara summir hermenn høvdu skottryggar búnar, men at teir vórðu noyddir at lata búnarnar frá sær, so aðrir kundu nýta teir.

Steve Roberts var ímillum teirra, sum máttu lata tann skottrygga búnan frá sær.Stutt eftir varð hann skotin. Samantha Robert er komin til ta niðurstøðu, at ovasta bretska herleiðslan hevði ábyrgdina av tí, sum hendi, og tí krevur hon, at verjumálaráðharrin skal fara frá. Men Geoff Hoon hevur sagt, at hann ætlar ikki at leggja frá sær.

## Vandin veksur

Ein kanning avdúkar nú, at meirilutin av fólkinum í fleiri evropeiskum londum halda, at heimsfriðurin er í størri vanda nú enn fyri einum ári síðani.

Sambært kanningini, sum franski granskingarbólkurin Ipsos hevur gjørt, halda meiri enn 60 prosent av fólkinum í Bretlandi, Fraklandi, Týsklandi, Italia og Spania, at heimurin er ikki so tryggur longur. Tey eru heldur ikki í iva um, hvat er tann størsta hóttanin, tí heili 71 prosent av teimum spurdu svara, at altjóða yvirgangur er tann størsta hóttanin ímóti heimsfriðinum.

Men kanningin hjá Ipsos vísir eisini, at evropearar eru til reiðar at taka neyðug stig fyri at basa yvirganginum. 79 prosent siga, at tey taka undir við at nýta hermegi ímóti yvirganginum, og 95 prosent siga, at tey høvdu atkvøtt fyri, vórðu tey spurd, um teirra herur skal nýtast ímóti altjóða yvirgangi.

## Oljufeløg skattalætta

Fleiri borgarstjórar á Vesturlandinum í Noregi skjóta nú upp, at Statoil, Hydro og hini oljufeløgini, sum eru virkin á norska landgrunninum, skulu fáa skattalætta.

Sum er gjalda oljufeløgini 78 prosent av avlopinum í skatti, og feløgini hava í seinastuni gjørt greitt, at virksemið á norska landgrunninum fer at minka í komandi árum. Hetta hevur fingið borgarstjórarnar fram við norsku vesturstrondini at gera vart við seg. Teir siga, at tað fer at fáa sera álvarssamar avleiðingar, minkar virksemið hjá oljufeløgunum. Summir teirra halda, at minst 16.000 arbeiðspláss eru í vanda.

Borgarstjórin í Bergen, Hermen Friele, hevur tí saman við øðrum borgarstjórum skrivað Per Kristiani Foss, fíggjarmálaráðharra og Ernu Solberg, kommunumálaráðharra eitt bræv, har teir ávara um avleiðingarnar. Samstundis mæla teir ráðharrunum til at virka fyri, at oljufeløgini fáa skattalætta, so tey kunnu halda verandi virkseminum uppi.

## Nazibrotsmaður tikin

Løgreglan í Týsklandi tók mánadagin ein mann, sum er undir illgruna fyri at hava framt hópmorð í Slovakia í 1945.

Tann nú 86 ára gamli Ladislav Niznansky er føddur í Slovakia, men hevur verið týskur ríkisborgari síðani 1996. Í 1944 og 1945 stóð hann á odda fyri einari deild hjá nazistunum, sum hevði fingið ta serligu uppgávu at gera av við slovakar, sum høvdu roynt at gera uppreistur ímóti týska hersetingarvaldinum í 1944. Nú verður hildið, at deild hansara myrdi 164 fólk, teirra millum 70 kvinnur og 51 børn, í bygdunum Ostry Grun og Kiak. Eisini verður deildin løgd undir at hava beint fyri 18 jødum í bygdini Ksnina.

Aftan á seinna heimsbardaga flýddi Ladislav Niznansky til Eysturríkis og seinni til Týsklands. Eitt skifti arbeiddi hann hjá amerikonsku útvarpsstøðini Radio Free Europe.




*John Kerry vann tað fyrsta uppstillingarvalið hjá demokratunum*

*Mynd: Reuters*

# Kerry fekk fyrsta stikkið

**John Kerry vann tað fyrsta uppstillingarvalið hjá demokratunum til forsetavalið í heyst. Eitt annað valevni hevur longu tikið seg aftur**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Spenningurin var stórur upp undir tað fyrsta uppstillingarvalið hjá demokratunum, og alr bendi á ein harðan dyst ímillum fýra av valevnunum.

Men teir demokratisku veljararnir hugsaðu ikki sum serfrøðingarnir. Tá upptalt varð, hevði senatorurin John Kerry fingið 38 prosent av atkvøðunum, og á øðrum plássi hevði John Edwards fingið 32 prosent. Howard Dean, sum mong hava mett sum tann, ið skal bjóða George W. Bush, av, fekk bara 18 prosent. Hjá tí fjórða valevninum, Dick Gephardt, gjørdist valið í Iowa bæði byrjanin og endin. Hann fekk bara 11 prosent, og aftaná boðaði hann frá, at hann tók seg burtur úr valstríðnum.

Eygleiðarar siga, at orðaskiftið undan uppstillingarvalinum er broytt í seinastuni, og at tað er komið John Kerry og John Edwards til góðar. Hóast tann fyrri vann í Iowa, halda flestu eygleiðararnir, at John Edwards er tann, sum hevur tann besta møguleikan at gerast forsetavalevni hjá demokratunum. Hann er tann betri røðarin, og sum gamal sakførari dugir hann sera væl at snúgva sær í politiskum dystum, siga eygleiðararnir.

Teir báðir sleppa at royna seg aftur næsta vikuskiftið. Tá verður uppstillingarval í New Hampshire.

# Anna Lind var kanska ikki hansara fyrsta offur

**Svenska løgreglan kannar nú, um Mijailo Mijailovic myrdi ein 77 ára gamlan mann fyri einum góðum ári síðani**

LIND-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 77 ára gamli Nils Bergman varð funnin deyður nærhendis heimi sínum í býarpartinum Solna tann 14. november í 2002. Kanningar avdúkaðu, at hann var vorðin stungin við knívi.



*Mijailo Mijailovic. Kanska var Anna Lindh ikki hansara fyrsta offur*

*Mynd: Reuters*

Um tað mundið búði Mijailo Mijailovic ikki so langt burtur haðani. Hann búði hjá einum hjúnum, og tey hava greitt løgregluni frá, at Mijailo Mijailovic hevði altíð knív uppi á sær, og at hann javnan tosaði um, at hann ætlaði at myrða onkran.

Ein hýruvognaførari, sum koyrdi Mijailo Mijailovic aftan á morðið á Onnu Lindh tann 10. september í fjør, hevur greitt frá, at maðurin gjørdist óróligur, tá teir koyrdu fram við tí staðnum í Solna, har Nils Bergman varð funnin.

Undir avhoyringunum tann 7. januar spurdi ákærin Mijailo Mijailovic, um hann hevði framt morð fyrr. Hann segði nei, men viðgekk beint aftaná, at hann einaferð hevði sagt einum lækna, at hann hevði framt eitt morð.

– Hetta er áhugavert. Vit hava alla tíðina hildið, at tað var ein sjúkur maður, sum myrdi Nils Bergman, sigur Lone Caallias, støðleiðari hjá løgregluni í Solna, við blaðið Expressen.

ítróttur
Nr. 13 • mikudagur • 21. januar 2004 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Finalistarnir skulu finnast I

**Tær fýra hálvfinalunum í Coca-Cola kappingini verða leiktar mikukvøldið, og serliga man spenningurin vera stórur um tær báðar uppgerðirnar í høllini í Vestmanna**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*




*Tað plagar at standa nógv á, tá VÍF og StÍF hittast, og dysturin mikukvøldið man neyvan verða nakað undantak í so máta*

Tað eru nú bert tríggjar vikur, til steypafinalurnar í hondbólti standa á skránni, og enn eru átta lið eftir í bólkinum, sum kappast um tey fýra plássini í Ítróttarhøllini á Hálsi.

Hjá kvinnunum er støðan tann, at Kyndil, Stjørnan, VÍF og VB eru komin í hálvfinalurnar.

Í høllin á Hálsi verður dystur millum Kyndil og Stjørnuna, og her er einki at ivast í, at størsti favoritturin til finaluplássini skal finnast. Kyndil er í løtuni á niðasta plássinum í fremstu kvinnudeildini, og Stjørnan er á ovasta tindinum, so bara mett eftir hesum, skuldi talan verðið um ein tryggan sigur til klaksvíkskvinnurnar. Avrikini á vøllinum ígjøgnum árið hava á ongan hátt talað fyri, at Kyndil her skal skapa nakað óvæntað, og hóast tað hevur ljóðað, at Lotte Sørensen nú aftur skal spæla við besta liðnum, og at Sabina Frølund er komin aftur til landið, so má tað metast ógvuliga ivasamt, um hetta er nóg mikið til at skala Stjørnuna.

Hinvegin tykist spenningurin um kvinnudystin í Vestmanna at vera nakað væl størri. Fyri stuttum leiktu VB og VÍF eitt brak av einum dysti í Vági, har VB vann við einum máli, og tað er einki at ivast í, at VÍF ætlar at hevna hetta tapið. Ikki minst eftir at liðið nú eftir øllum at døma hevur útspælt sín leiklut í gullstríðnum eftir tapið fyri Stjørnuni. Tí er steypakappingin ivaleyst fremst í huganum hjá liðnum nú, og so er spurningurin, hvørt VB eisini á saman hátt megnar at savna alla orkuna um hendan dystin.

**Brak í Vestmanna**

Hjá monnunum hevur Kyndil eisini heimavøll, og her eru tað teir grønu úr Havn, sum mugu átaka sær favoritt-leiklutin. Kyndil er í løtuni oddalið í bestu mansdeildini, og bara tað í sjálvum sær talar fyri, at teir eiga at koma víðari til finaluna. Ikki minst tá hoyvíkingar samstundis eru á niðasta plássinum í deildini.

Tað skal tó havast í huga, at einastu ferð Kyndil hevur tapt dyst hetta kappingarárið var ímóti júst H71, men júst tann upplivingin eigur at vera somikið stórur lærupeningur hjá Kyndli, at teir ikki detta í somu grøvina enn einaferð. Spurningurin er tó, hvussu væl Kyndil er fyri til hálvfinalurnar. Landsliðsferðin til Rumenia var ikki blíð við føroyska landsliðið, og millum teir leikarar, sum nú dragast við skaða, teljast bæði Janus Einar Sørensen og Hans Áki Dal-Christiansen, og so er spurningurin, hvørt teir verða førir fyri at spæla, ella hvussu Kyndil fer at standa seg uttan teir báðar.

Seinasti dysturin mikukvøldið er helst samstundis tann, sum størsti spenningurn er um. StÍF og VÍF hava hesi seinnu árini havt fyri vana at tørna saman í steypakappingini, og síðani 1998 er tað bara eina ferð komið fyri, at tey ikki hava drigið hvørt annað onkra staðni á vegnum. Hesi bæði seinnu árini hevur tað verið í hálvfinaluni, at slagið teirra millum hevur staðið, og báðu ferðirnar hava tað verð strandingarnir, sum hava verið drúgvari.

Men teir so væl kendu marginalarnir hava tó verið smáir. Fyri tveimum árum síðani var bert eitt mál á muni, tá úrslitini fyri báðar hálvfinalurnar vórðu løgd saman, og í fjør stóð á jøvnum, men tá áttu strandingarnir so fyrimunin av, at teir høvdu skotið fleiri mál á útvølli.

Tí vilja vestmenningarnir vera við, at tað í ár eru teir, sum standa fyri tørni í so máta, og tað má eisini sigast, at møguleikarnir eru ikki heilt eingir. Seinast liðini hittust í landskappingini, gjørdi VÍF rættiliga bart við einum knúsandi 30-23 sigri, og so telir tað eisini við, at StÍF má vera kanska mest týðandi leikaran á liðnum fyriuttan. Sveinur Justinussen kom nevnliga aftur úr Rumenia við gipsi um hondina, og so er spurningurin, hvussu strandingarnir fara at standa seg uttan hansara hjálp.

Tað er ein spurningur, sum í fyrsta lagi verður svaraður i annaðkvøld, men søgan handan dystirnar millum liðini bæði sigur í øllum førum so mikið sum tað, at talan fer at gerast um eina framúr spennandi uppgerð í Vestmanna mikukvøldið.

# KÍ roynir áleypara

23 ára gmali Kenneth Knudsen, sum annars hevur leikt við Vejle, fer hesar komandi dagarnar at royndarvenja við KÍ. Hetta skrivar Norðlýsið á netinum, og hevur blaðið fingið tíðindini váttað av Bill McLeod Jacobsen, sum dagliga starvast sum høvuðsvenjari fyri yngru deildirnar hjá KÍ.

Við hesum er líkt til, at KÍ longu er í ferð við at tippa holið eftir Hjalgrím Elttør, sum fyri stuttum gjørdi av, at hann verður triði føroyingurin, sum í ár fer at royna seg hjá danska Fremad Amager.

Enn er tó ikki tikin endalig støða til, hvørt Kenneth Knudsen verður partur av hópinum hjá KÍ komandi kappingarárið. Ove Flindt Bjerg, sum verður venjari hjá liðnum í ár, kemur í næstum til landið, og tað verður so hann, sum fer at taka endaligu avgerðina um, hvørt leikarin hevur neyðugu dygdirnar ella ikki.

**-jm**